# dur í egnum anda





*Tonny Brems Knudsen er lektari í stjórnmálafrøði á í við lærda háskúlan í Århus*

veruleikanum fingið sítt egna land, sum ikki er beinleiðis partur í stríðnum í restina av Irak í dag. Kurdarnir hava fingið sítt, shiitarnir sítt og sunniarnir koyrdir frá. Tí er tað, sum Tonny Brems Knudsen, lektari í Stjórnmálafrøði í Århus sigur, at sunniarnir hava ikki annað val enn at berjast fyri at fáa betri sømdir enn tað, sum tað er lagt upp til í dag.

**Uppgerð?**

Tonny vísir eisini á, at rættarmálið ímóti Saddam í sjálvum sær vísir, hvussu trupul støðan í Irak er. Tað er eingin ivi um, at Saddam hevur nógv brot á samvitskuni. Og tað er heldur eingin ivi um, at hann hevur framt nógvar ræðuligar gerðir. Men tað tykist rættiliga meiningsleyst í eini uppgerð bert at taka nøkur brot, døma hann og so heingja hann skjótast gjørligt. Tú brúkar ikki møguleikan at gera upp við hansara tíð og ræðuleikar, og fært tí heldur ikki øll viðurskifti fram í ljósmálan. Hetta fær tí alla hugsanina um eina uppgerð við Saddam-tíðina at fána. Sjálvur mátin, hann bleiv tikin av døgum, ber nógv meira brá av at Irak koyrir í sama hugsunarhátti sum undir Saddam. At hann skuldi takast av døgum í skundi líkist meira hevnd, og so sjálvandi filmsupptøkan, har hann verður spottaður, ger ilt verri, heldur Tonny Brems Knudsen.

**Vann Saddam?**

Tonny metir tó, at Saddam vann síðsta leikin, tí hann stóð fattur og tók deyðarevsingina, sum var tað ein av váðunum í at liva lívið, sum hann hevur livað. Allar umstøðurnar kring rættarmálið líkjast meira tí Irak, ið Saddam stýrdi, enn einum fólkaræði; Eingin náði, ræðulig revsing og ikki nógv hugsan um rættartrygd. Tonny metir tí, at alt kring rættarmálið og deyðarevsingina av Saddam prógvar tað Irak, sum Saddam stýrdi, og tað er tí afturlítandi og ikki á veg frameftir. Munurin er bara, at nú er tað shiitarnir, sum sita á valdinum, og Irak fer sama veg sum undir Saddam.

**Gøla**

Tonny fer so langt sum at kalla umstøðurnar, tá Saddam bleiv hongdur, fyri eina gølu. Tað sæst eisini aftur á, at dagfestingin, tá hinir báðir deyðadømdu skulu takast av døgum, er útsett - m.a. eftir áheitan frá Louse Arbour frá ST. Og nú um vikuskiftið hevur nýggi ST aðalskrivarin Ban Ki-moon heitt á Irak um at útseta deyðarevsingina. Og serliga Gordon Brown, sum helst er komandi forsætisráðharrin í Bretlandi, hevur kritisera avrættingina av Saddam rættiliga harðliga.



*Hann tók revsingina og niðurgerðina og vann tí seinasta stríðið*

**Shia og sunni stríð**

Tonny Brems Knudsen hevur fyrr víst á, at í Irak er beinleiðis stríð millum shia og sunni muslimar, og at hetta stríðið kann elva til stórar trupulleikar í Miðeystri. M.a. tí Saudi Arabia longu hevur gjørt vart við, at tað ikki ætlar at lata sær lynda, at sunniar standa við sviðusoð í Irak, sum støðan er í dag. Framferðin, tá Saddam varð tikin av døgum og átrúnaðarliga vanvirdur, varpar ljós á júst henda trupulleikan, og tað sæst m.a. við at stjórnin í Irak hevur handtikið tveir persónar í samband við filmsupptøkuna. Týdningurin av, at vanvirðingin bleiv almenn, sæst eisini aftur í, at øsingin í Irak snýr seg um júst vanvirðingina og almannakunningina av filmingini - og ikki tað at Saddam bleiv tikin av døgum! Tað høvdu tey flestu viðurkent, at so fór at verða. Tonny leggur at enda afturat, at útsagnirnar frá bæði Bush sjálvum og Hvítu Húsunum heldur ikki vísa á, at tað er eitt framlítandi Irak, sum verður grundlagt við stuðli frá Bush stjórnini.

**Í størri høpi?**

Meðan eyguni eru vend ímóti Irak, síggja vit samstundis eitt annað stríð, sum fer fram í Somalia, har átrúnaðurin sær út til at hava avgerandi leiklutin á stuðulin. USA hevur longu lagt seg uttanfyri somalisku strondini at fanga islamistar, tí USA hevur alla tíðina mett, at beinleiðis samband var ímillum Al-Qaeda og islamistarnar í Somalia. Har vóru bara ikki nóg góð prógv. Somalia er eisini eitt sunni muslimskt land og tí kann tað skjótt henda, at eisini hetta landið - sum hevur verið uttan myndugleikar og almenna skipan í 16 ár - verið drigið upp í stríðið, har vald, átrúnaður og yvirgangur verður vavt saman í ein ellubita.